EB/Streymur - GÍ 1-1 (0-1):

# Javnleikur í ódnarveðri

**EB/Streymur og GÍ áttu hvør sín hálvleik í ódnarveðrinum á Mølini sunnudagin, og eitt stig í part var á góðari leið**

1. DEILD
*Stefan í Skorini*

Tað eru fýra pláss ímillum EB/Streym og GÍ á stigatalvuni, men bert trý stig skilja liðini. Miðjan í føroysku 1. deild er rættiliga tøtt, og bert ein sigur skal til fyri at leypa nøkur pláss uppeftir stigatalvuni.

GÍ hevur havt eina sera góða byrjan seinnu hálvu av landskappingini, men í síðstu viku kom stígur í, tá gøtumenn taptu fyri KÍ. EB/Streymur hevur hinvegin ligið gott í svinginum gjøgnum alla kappingina, tað vil siga, at teir ongantíð hava verið í niðurflytingarvanda, men enn vantar nakað, áðrenn talan kann gerast um evropeiskan fótbólt hjá EB/Streymi.

## Vindurin stýrdi

Tað var at kalla vónleyst at spæla fótbólt á Mølini sunnudagin. Vindurin var nógvur, og regnið oysti niður. Av tí sama var ongantíð nakað serligt fótbóltsspæl at síggja í dystinum. Spurningurin var, hvør dugdi at gera sær dælt av vindinum á frægasta hátt. Tað dugdu liðini eins gott, og tí var eingin vinnari.

GÍ átti fyrra hálvleik, tí at tá høvdu teir vindin við sær. Spælið gekk fyri tað mesta fyri seg á hálvuni hjá heimaliðnum. Málið hjá GÍ kom eftir ein góðan hálvan tíma. Hans Pauli Petersen royndi seg útifrá við skot, sum Gunnar á Steig bert hálvbjargaði. Bólturin datt útaftur har Krzysztof Popczynski togdi seg eftir bóltinum, men hann var ov stuttur. Ístaðin var Hanus Jacobsen komin við fram úr verjuni, og hann kundi seta bóltin í netið til 1-0 til gestirnar. Kanska Gunnar má taka hetta málið á sín kappa, tí at hann ikki helt skotinum ella beindi tað burtur av vandaleið.

GÍ hevði greiða yvirvág, men tað eydnaðist ikki í nóg stóran mun at gera sær dælt av hesi yvirvág. Tað eina málið vísti seg ikki at vera nóg mikið.

## EB/Streymur tók yvir

Í seinna hálvleiki var tað hinvegin heimaliðið, ið hevði fyrimun av vindinum, og sum dysturin leið vaks hann eisini vindin munandi, so tað gjørdist torførari at fáa nakað nevnivert fótbóltsspæl at koyra.

Longu fimm minuttir inn í seinna hálvleik fekk EB/Streymur útjavnandi málið. Fróði Clementsen royndi seg við beinleiðis frísparki, sum kom í múrin. Bólturin datt fyri føturnar á Sorin Anghel, ið úr spískum antin skeyt uppá mál ella legði innfyri. Tað eru ymsar frágreiðingar um tað. Men bólturin fór um høvdið hjá Atla Gregersen í netið til endaliga úrslitið 1-1.

Restin av seinna hálvleiki gjørdist eitt langt álop á málið hjá GÍ. Men Hallur Hansen í málinum og hinir verjuleikararnir stóðu stinnir og lótu ikki EB/-Streym fáa sigursmálið.

Andrzei Pacek hevði kanska bestu royndina at fáa vinnandi málið. Eitt hornaspark elvdi til trunkaspæl í brotsteiginum hjá GÍ, og Pacek fekk fótin á bóltin, sum tó rakti stongina og fór útaftur í spælið.

Annars var dysturin rættiliga javnur, um vit telja málmøguleikarnar til liðini bæði, og tí var tað á góðari leið, at tey fingu eitt stig hvør burturúr dystinum.

GÍ hevur framvegis eyguni eftir triðja plássinum hjá Skála. Tað eru fimm stig upp til skálamenn, og tólv stig eru eftir at spæla um. GÍ hevur eisini ein heimadyst ímóti júst Skála í triðseinasta umfarinum.

EB/Streymur kann kenna seg trygt undan niðurflyting, men hinvegin er ov stórt glopp upp til bronsumerkini, og tí kann tað vera torført at motivera leikararnar til teir seinastu dystirnar.



*Bárður Olsen og málskjúttin Hanus Jacobsen dystast um bóltin í heldur illfýsna veðrinum á Mølini sunnudagin. Javnleikur var á góðari leið í einum dysti, har liðini áttu hvør sín hálvleik*

### FAKTA UM DYSTIN

**EB/Streymur - GÍ 1-1 (0-1)**
0-1: Hanus Jacobsen, 34
1-1: Sorin Anghel, 50
**EB/Streymur:** Gunnar á Steig - Carl Høgnesen, Fróði Clementsen, Andrzei Pacek, Gert Hansen - Bárður Olsen, Hans Pauli Samuelsen, Marni Djurhuus, Hallur Jacobsen (Esmar Eiðisgarð, 69) - Sorin Anghel, Sonni L. Petersen
**GÍ:** Hallur Hansen - Hans Pauli Petersen, Kaj Ennigarð, Atli Gregersen, Hanus Jacobsen - Áslakkur Petersen, Símun Louis Jacobsen, Súni Olsen, Poul Henning Jacobsen - Adam Paluchek, Krzysztof Popczynszki


TOYOTA AVENSIS TIL SØLU



LINE SOL FRÁ DESEMBER 2001
· 1,8 l BENSINMOTOR
· 135 HK.

ER VÆL ÚTGJØRDUR, OG HEVUR M.A.:
· AIR-CONDITION
· TRÆPANELIR
· EL-DRIVNAR RÚTAR
· TOKULYKTIR OG SPORTSFELGUR.
· PÍKADEKK Á FELGUM FYLGJA VIÐ.

PRÍSUPPSKOT: 165.000 KR.

- TEL 22 33 36 / 34 18 23 -




# Eingin føroyskur sigur

**Amatørlið er á odda, og verjuspælararnir á landsliðnum býttu stigini millum sín**

DANMARK 1. DEILD
*Jóannes Hansen*

Vikuskiftið var einki serligt hjá føroyingunum í næstbestu donsku deildini. Einki av teimum trimum liðunum, sum føroyingar eru á, fekk fulla úrtøku. Tey spældu øll javnt.

Jón Rói Jacobsen var í miðverjuni hjá Frem, og Johan Byrial Hansen spældi við Horsens, sum vitjaði í Valby. Jón Rói og teir mistu ein mann áðrenn ein hálvur tími var farin. Kortini megnaðu teir at leggja seg á odda. Frammanundan høvdu teir havt tvær góðar skotroyndir. Jón Rói var meistari fyri aðrari. Tá ið tað restaðu fimm minuttir, eydnaðist tað Horsens at javna til 1-1.

Gunnar Nielsen var eykamálverji hjá Frem.

Sundby Idrætspark er framvegis undir umvæling. Fremad Amager hevði tí heimavøll í Tårnby ímóti Nykøbing Falster. Andrew av Fløtum var annar av álopsspælarunum hjá heimaliðnum, meðan Jann Ingi Petersen og Hjalgrím Elttør vóru á beinkinum. Gestirnir løgdu seg framum 2-0, áðrenn heimaliðið svaraði aftur. Fremad Amager javnaði til 2-2, og teir misnýttu eitt brotspark.

Oddalið í næstbestu donsku deildini er HIK. Hellerup liðið er mannað við amatørum, og tað er púra óvæntað, at teir eru oddalið. Næstovast er Vejle, sum hevur havt Christian Høgna Jacobsen á liðnum. Christian Høgni býr nú í Runavík og hoyrir ikki til Vejle longur. Hesa ferð vann Vejle 2-1 á heimavølli ímóti Brønshøj.



# FCK vann fyri fyrstu ferð

**Brøndby var fyrsta felagið, sum megnaði at fáa fult frá uppflytarunum úr Silkeborg**

SUPERLIGAN
*Jóannes Hansen*

Í fjórða umfarinum eydnaðist tað FCK at fáa fulla úrtøku. FCK heevði vitjan av AaB. Talan var um rættuliga spennandi og undirhaldandi uppgerð. Heimaliðið vann 3-2. Hetta var fyrsta ferðin í hesum kappingarárinum, at tað eydnaðist FCK at vinna. Zuma var fyri fyrstu ferð í hesum kappingarárinum í álopinum saman við Santos. FCK venjarin, Hans Backe, segði eftir dystin, at Zuma hevði gjørt ógvuliga stóran mun.

Álvaro Santos skoraði fyri fyrstu ferð í ár. Hini FCK málini skoraðu Magne Hoseth og Jesper Bech, sum var á miðvøllinum.

Brøndby var fyrsta felagið, sum megnaði at vinna á uppflytarunum úr Silkeborg. Dysturin í Brøndby endaði 1-0. Esbjerg er framvegis væl við. Á heimavølli vunnu teir ikki minni enn 7-2 á Herfølge, sum stríddi seg upp á 2-2, eftir at heimaliðið hevði verið frammanfyri 2-0. Men so gekk heilt galið hjá Herfølge.

Í Viborg vóru teir heilt í kjallaranum, eftir at teir í síðstu løtu høvdu tapt 1-0 ímóti FC Nordsjælland.

FCMidtjylland er væl fyri. Hesa ferð áttu teir heimavøll ímóti uppflytarnum úr Randers. FCM vann 3-1, og serliga var tað Mohammed Zidan, sum gjørdi um seg. Hann skoraði tvey mál, og eingin ivast í, at hann heilt skjótt fer at verða seldur til okkurt stórt útlendskt felag. Randers hevur í fýra teimum fyrstu royndunum í bestu deildini einki stig fingið, og tað verður roknað við, at teir fara at verða skjótir niður aftur í næstbestu deildina.

Í Århus er lagið avbera gott. Eftir at AGF leingi hevur verið at finna í tyngra endanum, hevur tað í nýggja kappingarárinum gingið sum eftir ánni. Hesa ferð vunnu teir 2-0 í Odense.

Todi Jónsson var ikki partur av FCK liðnum hesa ferð. Sum tað var sagt í blaðnum leygardagin, so er Todi skaddur í knænum. Tað verður roknað við, at liðbandsskaðin fer at hava við sær, at hann ikki kann venja og spæla fótbólt næstu 4-6 vikurnar.




Føroya Banki í Niels Finsensgøtu nýtt andlit

Í hesum sambandi verður bjóðað til

móttøku

fríggjadagin 3. september frá kl. 15-17

Á skránni verður okkurt lætt til matna og livandi tónleikur við Lenu & Niclasi, Páll Finnur Páll og Martin Joensen Band.

Øll eru hjartaliga vælkomin.

FØROYA BANKI

pétur & pétur · 320870